# FC Suðuroy danskan framherja

**FÓTBÓLTUR** 24 ára gamal málrevur skal fáa suðuroyarliðið uppaftur í bestu deildina

Uni Holm Johannesen

FC Suðuroy, sum skal spæla í næstbestu deildini í 2011, hevur knýtt ein danskan framherja at hópinum. Talan er um 24 ára gamla Nicklas Paulsen, sum hevur skotið eina rúgvu av málum í Danmarksseriuni.

Framherjin hevur verið í samráðingum við fleiri donsk feløg, men uttan at gera nakra avtalu, so nú hevur hann leitað sær til Føroya í staðin, skrivar www.ligabold.dk.

– Støðið svarar til Danmarksseriuna, og umstøðurnar eru fínar, sigur hann í stuttari viðmerking við heimasíðuna.

Nicklas Paulsen skjeyt 18 mál fyri Svebølle í Danmarksseriuni síðsta kappingarár.

*uni@sosialurin.fo*

## Ítróttur um vikuskiftið

**Steypafinalur, vaksin**
12/02 13.30 Stjørnan-Tjaldur (kvinnur)
12/02 16.00 Neistin-KÍF (menn)

**Steypafinalur, yngru**
13/02 12.50 H71-VÍF (gentur 10)
13/02 13.35 Neistin-Tjaldur (dr. 10)
13/02 14.20 Neistin-Kyndil (gent. 12)
13/02 15.15 VÍF-Kyndil (dreingir 12)
13/02 16.10 Neistin-Kyndil (gent. 14)
13/02 17.20 H71-Kyndil (dreingir 14)
13/02 18.30 Neistin-Kyndil (gent. 17)
13/02 19.45 Neistin-Kyndil (dr. 17)

**Eik-ligan, kvinnur**
12/02 15.00 Dráttur-TB
12/02 15.00 ÍF-Fleyr
13/02 14.30 Mjølnir-ÍF
13/02 15.00 Fleyr-Dráttur
13/02 15.00 SÍ-Ternan
13/02 15.15 TB-KÍF

**Eik-ligan, menn**
11/02 18.30 SÍ-Mjølnir
13/02 13.30 TB-SÍ
13/02 16.30 Mjølnir-ÍF

**Frælsur ítróttur**
12/02 11.00 Crossrenning, Hoydalar

### Eik-ligan *kvinnur*

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNIÐ | TAPT | VUNNIN SETT | TAPT SETT | MUNUR | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Mjølnir | 16 | 14 | 2 | 45 | 10 | 35 | 16 |
| 2 | Fleyr | 15 | 12 | 3 | 39 | 17 | 22 | 13 |
| 3 | SÍ | 16 | 12 | 4 | 39 | 21 | 18 | 13 |
| 4 | ÍF | 15 | 9 | 6 | 32 | 23 | 9 | 10 |
| 5 | TB | 15 | 7 | 8 | 26 | 31 | -5 | 7 |
| 6 | Ternan | 16 | 4 | 12 | 17 | 40 | -23 | 5 |
| 7 | KÍF | 16 | 3 | 13 | 13 | 44 | -31 | 3 |
| 8 | Dráttur | 15 | 1 | 14 | 18 | 43 | -25 | 1 |

**KÍF-SÍ 0-3** (20-25, 19-25, 18-25)
**Ternan-Mjølnir 0-3** (18-25, 18-25, 18-25)

### Eik-ligan *menn*

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNIÐ | TAPT | VUNNIN SETT | TAPT SETT | MUNUR | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | ÍF | 16 | 14 | 2 | 44 | 12 | 32 | 18 |
| 2 | Mjølnir | 15 | 9 | 6 | 30 | 22 | 8 | 11 |
| 3 | SÍ | 15 | 9 | 6 | 34 | 19 | 15 | 10 |
| 4 | Fleyr | 16 | 7 | 9 | 24 | 33 | -9 | 9 |
| 5 | TB | 16 | 0 | 16 | 2 | 48 | -46 | 0 |




*Adina Petrea hjá Tjaldri er ein av teimum mongu skjúttunum, sum verða á vøllinum í kvinnufinaluni millum Stjørnuna og Tjaldur*

Mynd: Álvur Haraldsen

# Bestu skjúttarnir møtast

**HONDBÓLTUR** Venjararnir hjá Stjørnuni og Tjaldri eru samdir um, at verjuspælið fær nógv at siga í kvinnufinaluni, tí á teimum báðum liðunum eru bestu skjúttarnir í landinum

Hilmar Jan Hansen

Stjørnan og Tjaldur hava aftur í vetur verið liðini, ið hava kappast um oddasessin hjá kvinnunum, men hesa ferð tó við Neistanum sum triðja kappingarneytanum. Nú skulu Stjørnan og Tjaldur so spæla steypafinaluna hjá kvinnum, ið er onnur teirra millum. Í fyrraárið vann Stjørnan við einum máli.

– Hetta er ein finala, ið kann fara báðar vegir, tí hetta eru tvey góð lið, sum hava teir bestu skjúttarnar í landinum. Tí verður avgerandi, hvat av liðunum dugir betur at verja, sigur venjarin hjá Stjørnuni, Svein Rógvi Ljósstein.

Og hann fær undirtøku frá Trygva Mortensen, sum er venjari hjá Tjaldri: – At verjan er góð og málverjin stendur væl, kann fáa nógv at siga í steypafinaluni, sigur hann.

At nakað er um tað, sæst aftur á stigatalvuni í Sunset-kappingini, tí í miðal skjóta Stjørnan og Tjaldri millum 28 og 29 mál í hvørjum dysti, og bæði lið hava fleiri streingir at spæla uppá á bakkunum, har skjúttarnir vanliga gera nógv um seg.

## Vænta javnan dyst

Stjørnan er í steypafinaluni áttanda árið á rað, meðan Tjaldri bert spælir sína aðru finalu nakrantíð, so tí viðgongur Svein Rógvi Ljósstein, at Stjørnan nokk er favorittur:

– Í vetur hava vit vunnið tveir og Tjaldur ein, tá vit hava møtst, men sæð í ljósinum av, at Stjørnan so ofta hava verið í finaluni, eru vit helst ein pinkalítil favorittur. Men eg vænti altso, at vit fáa eina góða finalu, tí her eru flestu av teimum bestu spælarunum samlaðir í einum og sama dysti, sigur hann.

Trygvi Mortensen, sum fyrstu ferð sum venjari er í einari steypafinalu í hondbólti, væntar eisini ein góðan finaludyst:

– Eg trúgvi ikki so nógv upp á taktikk í einum slíkum dysti, tí her ræður snøgt sagt um at hava tann størra viljan at vinna. Liðini eru jøvn, so eg vænti ein spennandi og tættan dyst, har tað liðið vinnur, ið fær spælið at koyra og hevur neyðuga hepnið við sær, sigur hann.

*hilmarjan@sosialurin.fo*